




# Beinleiðis samband millum grønlendska og føroyska fólkið

*Allar orsøkir eru til, at grønlendingar og føroyingar samstarva og hava beinleiðis samband hvør við annan. Til tess krevjast bæði visjónir og ítøkilig átøk*

***Juliane Henningsen og Høgni Hoydal,***
***Norðuratlantsbólkurin***

Vit í Norðuratlantsbólkinum hava nú á 10. ári skipað samstarv millum føroyskar og grønlendskar fólkatingslimir. Her arbeiða vit í felag við øllum málum, ið hava týdning fyri grundleggjandi rættindini og fólkaræðið hjá grønlendska og føroyska fólkinum. Høvuðsmál okkara eru, at føroyingar og grønlendingar hava rættin til fult sjálvræði og hava sínar egnu røddir í heiminum.

Flokkar okkara – Inuit Ataqatigiit og Tjóðveldi – eru samstundis systurflokkar, ið byggja á samhaldsfasta hugsjón, og vit hava samstarvað leingi um mál av felags týdningi. Bæði beinleiðis ímillum okkara, umframt at vit samstarva í norðurlendskum høpi, í Útnorðurráðnum og í arktiskum samstarvi.

Í okkara samstarvi hava vit somuleiðis strembað eftir at knýta beinleiðis sambond millum føroyingar og grønlendingar. Bæði millum føroyingar og grønlendingar í Danmark – ikki minst millum tey lesandi. Og sambond millum felagsskapir, politikarar og fólk í londunum báðum sum heild.

**Grønland og Føroyar søguliga**

Vit hava allar orsøkir at økja um beinleiðis sambondini. Sæð úr føroyskum sjónarhorni, hevur Grønland havt markabrótandi týdning fyri føroyingar. Frá 1930'unum og fram til 80'ini var Grønland sera týðandi grundarlag fyri føroyska búskapin og fyri inntøkuna hjá húsarhaldunum í flestu føroysku bygdunum. Í Føroyingahavnini, á teimum mongu útróðrarplássunum og við føroyskum skipum virkaðu væl omanfyri 2000 føroyingar frá vári til heystar á hvørjum ári. Og nútímans føroysk flakavinna byrjaði í Føroyingahavnini. Neyvan finst nøkur føroysk familja, ið ikki hevur havt samband á onkran hátt til Grønlands.

Søguliga var beinleiðis samstarvið og sambandið millum føroyingar og grønlendingar tó avmarkað av politiskum ávum øll hesi árini, har grønlendingar høvdu lítla ávirkan á egin viðurskifti.

Ikki hava eins nógvir grønlendingar havt sítt virksemi í Føroyum. Men víst er tað, at fyri føroyingar, ið hava verið í Grønlandi og fyri grønlendingar, ið hava verið í Føroyum, verða bond knýtt, ið ikki fara burtur aftur.

**Ymisk í støðd – somu avbjóðingar**

Í dag ber til hjá okkum at samstarva beinleiðis og á jøvnum føti. Hóast londini eru so ólík í støðd og vavi, hava fólkini nógv í felag.

- Grønland og Føroyar hava somu royndir sum samfeløg, ið skulu menna seg við grundarlagi í havinum og livandi náttúrutilfeinginum.
- Bæði londini standa fyri komandi olju- ella øðrum ráevnisvinnum og teimum búskaparligu, sosialu, mentanarligu og umhvørvisligu avbjóðingunum, ið tað hevur við sær.
- Vit hava somu mentanarligu avbjóðingar við at styrkja okkara samleika, mál og mentan í altjóðagerðini.
- Á útbúgvingarøkinum skulu bæði londini tryggja miðal- og hægri útbúgvingar-møguleikar, og draga útbúgvið fólk heim.
- Veðurlagsbroytingar, varandi orka úr náttúrukeldunum, nýggjar siglingarleiðir og áhugamál hjá stórveldum í náttúrurikidøminum eru onnur stórmál, ið krevja samstarv frameftir.

**Ítøkilig átøk krevjast**

Seinastu árini hava vit ígjøgnum Norðuratlantsbólkin, í norðurlendskum samstarvi og ikki minst í Útnorðurráðnum, miðvíst virkað fyri at styrkja sambondini í Útnorði millum Føroyar, Grønland og Ísland. Tað krevur, at vit bøta um møguleikarnar fyri beinleiðis sambandi millum fólk, vinnu, útbúgvingar-, granskingar- og mentanarstovnar í Útnorði. Og her hava vit sett eina røð av uppskotum fram:

- Tað skal gerast lættari og bíligari at ferðast ímillum londini. (Her hava tíbetur verið ávísir batar. Eydnast tað at fáa fleiri ferðafólk, næmingar, heilsusamstarv, vinnulívssamstarv o.a. millum londini, kunnu ferðamøguleikarnir betrast framyvir.)
- Longu í fólkaskúlunum eiga at vit at læra munandi meira um samfeløgini, mentanina, málini og søguna hvør hjá øðrum.
- Ítøkiligt samstarv millum hægri lærustovnar, mentanar- og granskingarstovnar í londum okkara skal skipast – og er lutvíst byrjað.
- Vit hava skotið upp at stovnaðir verða sonevndir "útnorðurháskúlar", har næmingar úr okkara londum kunnu fara í styttri háskúlaskeið hvør hjá øðrum.
- Vit hava skotið upp, at tíðindir og sendingar úr londum okkara verða send regluliga hvør hjá øðrum.
- Vit hava arbeitt leingi fyri felags altjóða átøku til tess at betra um tilbúgving og trygd á sjónum í Norðuratlantshavi og arktiska økinum. Ein sáttmáli um hetta verður væntandi undirskrivaður í Nuuk í summar.
- Og vit hava lagt fleiri uppskot fram, ið kunnu styrkja samstarvið millum vinnu og politisku skipanirnar í londunum báðum – millum annað at skipa fyri árligum "topp-fundi" millum politisku leiðararnar í londunum.

**Miðdeplar – ikki útjaðarar**

Okkara visjón er, at londini í Norðuratlantshavi standa saman um okkara felags áhugamál í einum av heimsins ríkastu og mest áhugaverdu økjum, tá ræður um um náttúrutilfeingi, orkumøguleikar og mentanarligt tilfeingi. Vit skulu ikki síggja okkum sjálv sum útjaðaraøkir, men sum miðdeplar í Norðuratlantshavi og arktiska økinum.

Skal hetta eydnast, gerst tað ikki bert við politiskum proklamasjónum. Beinleiðis sambandið millum fólk, er fortreytin.